


*Fagnaðurin var stórur, tá VB fyrr í ár varð steypavinnari, og nú greipan er komin til høldar, er lagið ikki minni gott. Eisini hóast hetta seinasta varð staðfest, uttan at VB yvir høvur spældi*

# VB eru meistarar

**Uttan at spæla, fekk VB mikukvøldið meistaraheitið til høldar, tá Stjørnan vann á nú fyrrverandi meistarunum í Vestmanna**

FØROYAMEISTARAR
*Jákup Mørk*

- Hatta var nemt.

Tað vóru fyrstu orðini frá Boga Mortensen, sum er formaður í hondbóltsdeildini hjá VB, tá vit hósmorgunin ringdu til hansara við einum tillukku fyri nýkomna meistaraheitið.

Uttan at spæla hevði VB soleiðis ognað sær gullið, men tað var so als ikki nakað, sum tey í Vági roknaðu við mikudagin.

- Hvørt mikukvøld hava vit í hondbóltsnevndini fund, og soleiðis var eisini hesaferð. Ta einu ferðina ringdu vit so líka norður til Vestmanna fyri at vita, hvussu støðan var. Sagt varð, at Stjørnan tá var á odda við tveimum málum, og so gjørdist tað av álvara spennandi. Uppringirnar norðureftir gjørdust alt títtari, og hóast tað var javnt, so var støðan alla tíðina tann rætta, og tú kanst ætla, at tíðindini ferðaðust skjótt, sigur Bogi.

Fólk komu vestur í høllina, og tá alt so var leyst og liðugt, var klárt til gullhaldið. Leikararnir á liðnum vóru sjálvandi eisini komnar vestur, og hesar vórðu lempaðar upp í ein lastbil, sum við floytuni í botn koyrdi bygdina á tamb, meðan long bilarøð koyrdi aftanfyri. Meistaraheitið skuldi markerast, og eftir at tað soleiðis mundi vera allari bygdini greitt, at gulið var komið til høldar, varð farið út aftur til høllina, har borð í skundi vórðu riggað til, soleiðis at ein litil veitsla kundi haldast fyri leikarunum, sum nú loksins høvdu nátt máli sínum.

Og tað er neyvan at taka munnin ov fullan, tá sagt verður, at júst Bogi Mortensen mundi vera ein hin fegnasti av øllum, nú alt var greitt.

Sum formaður í hondbóltsdeildini hjá VB hevur hann í skjótt fleiri ár stríðst fyri at fáa liðið upp á ovastu rók, og sum venjari hevur hann eisini verið heilt nær við. Ikki minst ta ferðina, tá tríggir finaludystir og brotskastkapping máttu til, áðrenn Neistin ognaði sær gullið.

Og tá vit spurdu hann um hetta, duldi Bogi heldur ikki yvir, at kenslan var stór.

- Hetta er heilt fantastiskt. Sum tú sjálvur sigur, so havi eg verið við sum bæði venjari, formaður og ikki minst sum pápi, maður og svágur nú í nógv ár. Vónirnar hava ofta verið stórar, og onkun tíð hevur verið heilt tætt, men tað er so ikki fyrr enn nú, at tað er eydnast, og tað er ein ótrúlig kensla. Og ikki minst unni eg konuni hetta. Hon hevur nú spælt á besta liðnum í 22 ár, so hetta eigur hon so væl og virðiliga uppiborið.

Og at tað skuldi eydnast júst í ár, kann eisini tykjast heldur løgið. Undan kappingini vóru boðini, at VB nóg illa fekk mannað lið. Burtur vóru Sólrun Krosslá, Guðrunli Lágabø, Gurið Mortensen, Christina Holm, og Rannvá Augustinussen, og tí var málið í fyrstu atløgu sett nakað væl lægri, enn tað annars hevur verið seinnu árini. Seinni eru Gurið og Rannvá so komnar afturí aftur, men tað sá ikki serliga ljóst út.

- Tað hevur tú rætt í, heldur Bogi.

- Her stóð ikki alt ov væl til við fólki, men tað hevur kortini rigga alla tíðina. Kanska var tað eisini ein fyrimunur, at tað gekk long tíð, áðrenn vit vórðu roknaði millum favorittarnar. Einki trýst av nøkrum slag varð lagt á leikararnar, soleiðis at tær kundu spæla púrasta frítt og bara taka ein dyst í senn. Tað er so avgjørt nakað, sum hevur hjálpt til.

- Til stuttleikar kann eg nevna, at tá vit í oktober mánaði vunnu fyrsta heimadystin á VÍF, vóru einastu viðmerkingarnar úr Vestmanna, at nú máttu vit njóta hesa løtuna, sum vit vóru á odda. Tey vóru vís í, at hetta bara var upplop hjá okkum, men hevur so víst seg at verða nakað væl meira enn tað, sigur ein ikki sørt errin formaður.

Um orsøkirnar til gullið í aðrar mátar heldur Bogi, at tær hava verið fleiri. Tað er tó einki at ivast í, at sálarliga hevur liðið verið nógv sterkari í ár, soleiðis at tær alla tíðina hava klárað at koppa teimum jøvnu dystunum til egnan fyrimun. Ein eginleiki, sum liðið í stóran mun hevur saknað seinnu árini.

- Tað er í øllum førum ein týðandi orsøk, og partvíst hongur tað eisini saman við, at vónirnar vóru so lítlar undan árinum. Men eg haldi eisini, at leikararnir eiga stóran rós uppiborið fyri hetta. Tær hava alla tíðina tikið ein dyst í senn og hava hvørja ferð trúð upp á møguleikan fyri sigrinum, og so hvørt sum hesir eru blivnir fleiri í tali, er støðan bara batnað.

- Og so er tað eisini so, at kemi'in á liðnum skal vera hin rætta. Ikki minst her hjá okkum, har vit hava tríggjar útlendskar leikarar, tríggjar leikarar búsitandi í Havn og so restina her suðuri, skal nakað serligt til. Tað hevur bara víst seg, at samansetingin av leikarum hevur verið júst tann rætta,

- Skal eg taka nakran framum, so má tað tó vera venjarin hjá okkum, Aivaras Daugis. Hann hevur verið ein fantastiskur persónur at arbeiða saman við. Nú hava vit bæði í hond- og fótbólti havt nógvar leikarar her suðuri, og tó at vit hava havt góðar royndir av teimum flestu, so er Aivaras nakað fyri seg. Óvanliga avbalanseraður sum persónur, og so er hann eisini ein knallandi dugnaligur venjari, sum hevur verið sera miðvísur í bæði venjing og dystum. Hann hevur alla tíðina lagt dent á at fáa spælið at ganga skjótt, og nú í seinnu helvt hevur hetta so avgjørt verið avgerandi. Eg haldi ikki, at nakað av hinum liðunum í dag megnar at spæla eins skjótt, sum vit gera.

Og áðrenn vit heilt enda samrøðuna, so vil Bogi eisini lata eina heilsan til trúgvu áskoðararnar hjá vágbingum.

- Teir hava verið einastandandi. Eitt er, at vit hava havt góðan stuðul til heimadystirnar hjá okkum, men teir hava so sanniliga eisini stuðla aðrastaðni, tá tørvurin hevur verið størstur. Har vóru nógvir vágbingar í Havn, tá vit leiktu steypafinaluna, og bæði í Vestmanna og Klaksvík vóru nógv fólk við okkum. Tað haldi eg sigur nakað um stuðulin, sum tey hava givið okkum, og hetta eiga tey stóra tøkk fyri.

- So er bara at vóna, at tað kann bera til at fáa gullið handað nú komandi sunnudag, tá vit spæla seinasta heimadystin, heldur enn at fáa tað í Runavík á seinasta leikdegi. Tað haldi eg í øllum førum, at áskoðararnir hava uppiborið, men vit so vita, hvat HSF sigur til tað, sigur Bogi Mortensen at enda, áðrenn hann av álvara fór undir dagin, sum uttan iva man vera ein hin hugaligasti í tíðarskeiðinum sum formaður fyri hondbóltin í Vági.



# Umhugsa at fyrireika tvey róðrarøkir

**Tað kom ikki sørt óvart á strandingar og skálamenn, tá ið tað leygardagin var greitt, at teir skulu verða vertir fyri FM kappróðri á øðrum hvørjum ári**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*



*Á Skála høvdu tey als ikki roknað við, at tað skuldi fella teimuFM finalan fyri pør*

Teir høvdu bjóðað seg fram, men teir tordu ikki at rokna við, at tað skuldi eydnast teimum at vinna rættin at vera vertir fyri FM stevnum í kappróðri. Men hetta var júst tað, sum strandingar og skálamenn saman við hinum aðalfundar luttakarunum vóru vitni til gjørdist veruleiki leygardagin, tá ið Róðrarsambandið hevði aðalfund og m. a. gjørdi av, hvør skal verða vertur fyri sjeyndu FM stevnuni.

– Vit høvdu tosað við onkur onnur feløg, men vit roknaðu fyri vist við, at Eystanstevnan fór at fáa rættin at skipa fyri FM róðri á hvørjum ári. Tað hevði prátið og skrivingin frammanundan bent á, heldur Anfnn Gærdum, sum er formaður í róðrarfelagnum Stráluni á Strondum. Saman við Stranda Ítróttarfelag, Skála Ítróttarfelag og Skála Róðrarfelag høvdu Anfinn Gærdum og Strálan bjóðað seg fram at skipa fyri FM kapping, og tað tók aðalfundurin undir við, at teir skulu gera. Fundurin samtykti, at FM kapping skal annað hvørt ár vera á vestara armi á Skálafjørðinum, og annað hvørt ár verður hon í Vestmanna.

Hava tit gjørt tykkum greitt, hvussu tit fara at leggja róðurin til rættis?

– Hetta er púra nýtt. Tað er greitt, at vit hava ikki nógva tíð at leggja til rættis í. Kappingin verður hjá okkum í ár. Upprunaliga var ætlanin, at hetta skuldi verða avgjørt undan ársskiftinum, og nú eru vit komin tríggjar mánaðir inn í nýggja árið. Tí er neyðugt at fara undir fyrireikingarnar beinanvegin. Eitt tað fyrsta verður at heita á Matrikulstovuna um at máta okkum málið upp, sigur Anfinn Gærdum.

Hvussu ætla tit at leggja málið?

– Skálamenn og vit hava hugsað okkum, at enda málið skal vera á Hulki. Har er veðurgott, har er gott at koma hjá trailarnum, sum koma við bátunum, og har eru góðar umstøður hjá áskoðarunum. Vit hava møguleikar bæði at rógva inn ímóti Hulki og at rógva úteftir fjørðinum. Vit hava tosað um at máta bæði málini upp. So hava vit møguleika at rógva tað málið, sum líkindini eru betri á, sigur Anfinn Gærdum. Hann dugir ikki at siga neyvt, hvar málini verða, men hann roknar við, at uttara 2000 metra málið verður umleið á ferjuleguni á Strondum, og at innara 2000 metra málið verður Innan Glyvur.

### Rættulig stevna

Higartil hevur Skála havt eina bygdastevnu við kappróðri stutt undan norðoyarstevnuni, meðan Strendur hevur havt sína bygdarstevnu seinni á sumrinum. Teir hava roynt at skipa fyri kappróðri, men áhugin hevur ikki verið serliga stórur at taka lut. Nú tað er samtykt, at Skála og Strendur í felag skulu skipa fyri FM kappróðrarstevnu, verður neyðugt við umskipingum, sum teir ikki enn hava tosað um.

– Hesum fara vit at finna út av í felag. Á Skála er ítróttarhøll og fótbóltsvøllur, og vit hava bygdarhús. Harvið eru góðir karmar um tiltøk, sum vanliga plaga at vera á sovornum stevnum. Takið hjá okkum verður at finna út av,hvussu vit skulu fáa bestu nyttuna burtur úr karmunum, heldur Anfinn Gærdum.

Strandingar fara aftur í ár at luttaka við 6–mannafarinum Stráluni, men bara við monnum. Skálamenn hava ikki tikið lut í kappróðri tey seinastu árini. Hvussu tað verður við Skálabátinum og Bliki í ár er ikki greitt enn.

# Støkk-framsýning í Klaksvík

**Komandi sunnudag, hin 6. apríl, fer Fimleikafelagið Støkk av Glyvrum at hava framsýning í KÍ-høllini**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Støkk hevði í fjør eina sera væleydnaða framsýning í Klaksvík, sum varð væl móttikin av norðoyingum.

Tað er gomul siðvenja at Støkk fer til Klaksvíkar at vísa síni kynstur. Henda siðvenja hevur verið gloymd í nøkur ár, men nú er ætlanin at taka leistin uppaftur.

Við á framsýningini verða umleið 160 fimleikarar hjá Støkk. Fimleikurin, sum verður sýndur fram, er sera fjølbroyttur; frá vanligum liðum til reiðskapsfimleik á høgum støði og rútmisk úrvalslið. Umframt hetta verða tvey gestalið frá Klaksvíkar Fimleikafelag við á framsýningini. Tey eru 3. fl. gentur og 4. fl. gentur.

Meðan framsýningin er, verður páskareggjatombola í ítróttarhøllini til frama fyri Støkk. Framsýningin byrjar sunnudagin kl. 15:30 og varðar umleið hálvannan tíma.

Fimleikararnir hjá Støkk eru sera spentir at koma til Klaksvíkar at gera fimleik, og vóna tey, at øll fimleikaáhugað í norðoyggjum møta fjølment til framsýning í KÍ-høllini komandi sunnudag kl. 15:30.

# Eitt spæl úr Kagganum

Bogi Simonsen ger viðmerkingar til spælið, sum hann sjálvur var partur av

| | | |
|---|---|---|
| S/allir | 842 | |
| | J1086 | |
| | J104 | |
| | K85 | |
| K97 | | AJ53 |
| A2 | | K74 |
| Q862 | | AK93 |
| A964 | | J10 |
| | Q106 | |
| | Q953 | |
| | 75 | |
| | Q732 | |

| S | V | N | E |
|---|---|---|---|
| Allan D. Christiansen sen | | Bogi Simonsen | |
| 1kl | pass | 1rú | pass |
| 2rú | pass | 3hj 1) | pass |
| 4kl 2) | pass | 4sp 3) | pass |
| 5rú 4) | pass | 6rú | pass |
| pass | pass | | |

1) Trelde, spyr um makkarin hevur kontrol í hjartara, tvs. ess, kong, renonce ella singleton.
2) Hevur kontrol í hjartara og 2 ess.
3) Spyr eftir einum ikki áður vístum kontrolli í spaðara.
4) Hevur ein ikki vístan kontrol í spaðara og trumf frúgv.

Spælið er frá einum liðkappingarkvøldi hjá Bridgedeild Kaggans. Allan opnaði við einum kleyvara, eg meldaði ein rútara. Allan meldaði 2 rútarar, eitt frálíkt meld, ið ikki var meldað av nøkrum øðrum, standard meldið er nokk 1ut. Eg kom so at spæla 6 rútarar, kanska eitt sindur hart, men so sanniliga ikki uttan møguleikar.

Útspælið var rútara 7, ið eg tók heima, síðan spældi eg kleyvara drong, sum norðan tók við konginum, hann spældi trumf aftur. Eg vann stikkið á borðinum, spældi hjartara ess og kong og ein lítlan hjartara til trumf. Nú tók eg tann síðsta trumfin hjá mótpartinum og spældi kleyvara 10, sum áttu. Síðani tók eg tann síðsta trumfin, sunnan legði uttan at blunka spaðara 6 !!. Eg spældi so spaðara til kongin og tók fyri kleyvara ess, sum staðfesti, at sunnan helt kleyvaranum við frúnni. Skuldi eg nú spæla uppá, at sunnan eisini hevði spaðara frúgv, og tískil ikki megnar at halda bæði kleyvara og spaðara (skvis), ella skuldi eg spæla uppá, at spaðara frúgv sat hjá norðan og kundi klípast. Eg valdi at spæla uppá fyrra møguleika og tók fyri spaðara ess, sum tók frúnna við sær. 12 stikk.

# FM finalan fyri pør

**Komandi vikuskifti verða føroyameistararnir fyri pør í bridge funnir**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Hetta hendir, tá ið finalan verður leikt í Bridgehúsinum í Havn. Kappingin byrjar leygarmorgunin kl 10:00. Í finaluni luttaka 20 pør, ið hava tryggjað sær sæti í finaluni via hálvfinaluna, sum varð leikt fyri einum góðum mánaða síðan.

Í finaluni skulu spælast 76 spøl, 19 umfør á 4 spøl.

Tey 20 pøruni, sum luttaka í finaluni eru:

Bogi Simonsen — Rói á Rógvu Joensen
Carl Mikkelsen — Egil Helmsdal
Magni Jøkladal — Robert Langgaard
Oddmar Danielsen — Einar Ellingsgaard
Jákup Hjaltalin — Fríðhild Petersen
Petur Annfinn Johannesen — Eilif Petersen
Atli Hansen — Jógvan Ranghamar
Eyðun Jakobsen — Jana Mikkelsen
Per Kallsberg — Dánjal Pauli Mohr
Eyðun Jensen — Niels Nielsen
Árni Dam — Marner Joensen
Salomon Johansen — Zakaris Joensen
Símin Lassaberg — Eyðun Anthoniussen
Heðin Mouritsen — Jóannes Mouritsen
Henriette Svenstrup — Jóna Grunnveit
Edmund Joensen — Dia Petersen
Arnbjørn Sivertsen — Hans Jacob Petersen
Hallberg Arnfríðsson – Kaj Alstrup —
Helgi Joensen – Eyðun Joensen
Arnleyg Mikkelsen – Marjun Restorff